# Kollveltandi vælferðarpakki til føroyingar

**Føroyingar fáa nú møguleikan at tekna eina privata heilsutrygging frá Trygd, ið kallast viðgerðartrygd. Við viðgerðartrygd fært tú alt í einum pakka: ráðgeving, viðgerð og eftirviðgerð á einum privatsjúkrahúsi í Norðanlondum. – Hetta er eitt kollveltandi vælferðarprodukt, sigur Ali Celebi**

HEILSA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




Trygd kundi á tíðindafundi í morgun boða frá, at teir framyvir fara at bjóða føroyingum eitt alternativ ella ískoyti til verandi tryggingar- og heilsuskipan.

– Hetta er kollveltandi tíðindi, at føroyingar nú hava møguleika at tekna eina privata heilsutrygging, eina pakkaloysn við skipaðum viðurskiftum. Við viðgerðartrygd fært tú alt í einum pakka, ráðgeving, viðgerð og eftirviðgerð, greiddi Ali Celebi, stjóri á Trygd frá í morgun.

Við hesum fáa føroyingar møguleikar at leypa køina á Landssjúkrahúsinum yvir, tá vit hava ilt í knænum ella fingið ein diskusprolaps.

### Velja sjálvi

Møguleikin tryggjar, at føroyingar sjálvir kunnu velja at skurðviðgera knæið, eyguni ella hvat tað nú skal vera, á einum privatsjúkrahúsi í Danmark, Noreg ella Svøríki.

– Kundin velur sjálvur hvat fyri privatsjúkrahús hann við viðgerast á. Hann fær eisini ráðgeving í mun til hvat slag av viðgerð honum tørvar, og eisini um hvat sjúkrahús best og skjótast megnar ta uppgávuna, segði Ali Celebi á tíðindafundinum í morgun.

Men tað er ikki bara í Norðurlondum, at kundin hevur møguleika at viðgerast.

– Er tað soleiðis, at neyðuga hjálpin ella viðgerðin ikki fæst í Norðanlondum, so hava vit eisini møguleika at senda sjúklingin til USA ella aðrastaðni, har neyðuga hjálpin er at finna, vísti Ali Celebi.

### Onki bureaukrati

Stjórin á Trygd greiddi eisini frá, at við viðgerðartrygd er onki pappírsveldi tá tær tørvar hjálp.

– Við hesum verður onki bureaukrati tá tær tørvar hjálp, segði Ali Celebi, og greiddi frá, at bíðitíðin ongantíð verður meiri enn tíggju dagar, men at málið altíð er at fáa so skjóta viðgerð sum møguligt.

Spurdur um, hvat Trygd roknaði við at fáa burtur úr hesum, svaraði Ali Celebi, at hetta sjálvandi er nakað, sum skal geva yvirskot.

– Vit eru ein privat tryggingarfyritøka so sjálvandi skal hetta geva yvirskot. Men hugskotið er meiri enn at vinna pengar. Hetta er eitt vælferðarprodukt til vanliga føroyingin, vísti Ali Celebi á.

Við hesum sipaði Ali Celebi til, at tað vanliga ikki hevur borið til hjá einum og hvørjum at lata seg skurðviðgera uttanlands.

– Ein skurðviðgerð fyri dikusprolaps kann kosta 80.000 krónur, og at skurðviðgera eitt knæ kann lættliga kosta 15.000 krónur, og tað er tað ikki øll, sum hava ráð til.

– Men við hesum tilboðnum, er tað ikki einans tey ríku, tí øll hava møguleikan at tekna eina slíka trygging, segði Ali Celebi, stjóri á Trygd.

### Sjúkur fyri eina millión

Ali Celebi duldi ikki fyri, at Trygd roknar við at nýggja viðgerðartryggingin fær stóra undirtøku millum manna.

– Eg rokni við, at nógvir føroyingar fara at taka av hesum tilboðnum. Bíðitíðin fyri viðgerðum er ongin, og í mun til verandi støðu er hetta eitt risa framstig, greiddi Ali Celebi frá.

Prísirnir fyri tryggingina er svingandi, alt eftir hvussu gamal tú ert. Sum tjúgu ára gamal rindar tú 2000 krónur árliga fyri eina slíka trygging, meðan ein 55 ára gamal rindar einar 6000 krónur.

Men fyri tað fært tú sum kundi trygd fyri, at ein millión krónur kunnu verða nýttar upp á teg árliga til viðgerðir av ymsum slag. Ein millión er eitt ógvuliga høgt hámark, og Rikke Haaber frá International Health Insurance, samstarvsfelagin hjá Trygd, greiddi frá, at tað mesta tey higartil hava nýtt upp á eina sjúkling, er ein hálv millión krónur, og tað var ein krabbameinssjúklingur, sum skuldi viðgerast í USA.

### Lætta um sjúkrahústrýstið

Seinastu dagarnar hava nógvar atfinningar verið mótvegis Landssjúkrahúsinum, og tí var tað eisini ein rættiliga upplagdur spurningur, tá Ali Celebi varð spurdur um tað var av tilvild, at teir komu við sínum tilboðið júst nú.

– Vit hava á ongan hátt verið í samráð við Landssjúkrahúsið, men hava tingast við IHI um hetta í eitt hálvt ár nú, so tað er rein tilvild, at samanfallið er soleiðis, segði Ali Celebi.

Tískil kundi hann heldur ikki svara fyri, í hvønn mun, ella um hetta yvirhøvur fór at minka um trýstið á Landssjúkrahúsið, men hann kundi tó siga so mikið sum, at tað ikki var óhugsandi at so var.

## Samstarv við altjóða heilsutryggingarfyritøku

**Samstarvsfelagin í hesum nýggja útspælinum hjá Trygd, er ein altjóða heilsutryggingarstovnur, International Health Insurance, sum er millum heimsins fremstu á økinum**

HEILSA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyri at fáa hetta nýggja tilboðið upp at standa, hevur Trygd gjørt eina samstarvsavtalu við eina altjóða heilsutryggingarfyritøku, ið nevnist International Health Insurance (IHI).

IHI er millum heimsins fremstu heilsutryggingarfyritøkur, og fáast tey burturav heilsutryggingar.

Tað var Rikke Haaber frá IHI, ið greiddi frá teirra virksemi í síni heild, men eisini teirra samstarvi við Trygd.

– Vit hava tosað saman við Trygd í eitt hálvt ár eftirhondini, og beinanvegin komu vit ásamt um, at tað var 1. september vit skuldu kunngera hetta.

IHI hevur sum er skrivstovur í átta ymsum londum, frá USA til Japan og Bolivia, og alla staðni har tey koma, royna tey at tillaga teirra tryggingar eftir tørvinum hjá einstaka landinum.

Men IHI er ikki einasti samstarvsfelagin hjá Trygd í hesum her, tí fyri at flyta fólk av landinum at viðgerast er neyðugt við frakt, og í hesum sambandi hevur Trygd fingið eina avtalu í lag við Atlantic Airways. Og orsøkin til tað er, at Atlantsflog er tað felagið, ið hevur flest fráferðir úr Føroyum, og fyri kundan er tað avgerandi, at hann kann sleppa av landinum skjótast gjørligt.

# Kapping er altíð góð

**Tummas í Garði, sjúkrahússtjóri, fegnast um, at kapping kemur á heilsuøkinum, men hann mælir samstundis til, at vit varpa politiskt ljós á heilsuverkið sum heild**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tummas í Garði sigur, at privata sjúklingartryggingin er ein gongd, sum vit kenna frá grannalondunum, og sum ikki kemur dátt við hjá honum.

– Hetta er eitt slag av privatisering, sum vit mugu taka til eftirtektar og laga okkum eftir, tí kapping eigur altíð at gagna brúkaranum og at elva fram betri tænastu og góðsku, sigur Tummas í Garði, sum kortini ikki vónar, at privata sjúklingtryggingin fer at hava "amerikanskar tilstandir" við sær, har tey, sum ikki hava ráð, mugu lata sær lynda við vánaligari góðsku og tænastu.

– Vit hava eina heilsuskipan, sum onnur lond síggja upp til og eftirlíkna, og hana haldi eg, at vit politiskt eiga at verja, sigur Tummas í Garði.

### Kann lækka støðið

Her og nú kann hetta hava við sær, at trýstið á føroyska heilsuverkið lætnar, meðan vandin er, at peningur, sum kundi verið brúktur uppá almenna heilsuverkið, nú verður kanaliseraður niður á meginlandið, sigur Tummas í Garði.

Og hann undrar seg eitt sindur um, at talan bert verður um at senda fólk av landinum, tí kanska hevði borið til, at fingið í lag eina samstarvsavtalu við føroyska heilsuverkið, har Trygd kundi brúkt og goldið fyri tænastur her á landi.

– Ein stórur vansi kann blíva, at um fólk í alt størri mun fara at brúka útlendskar heilsutænastur, so undirgravar tað okkara førleikar og lækkar um rutinurnar hjá okkara serlæknum. Sostatt er vandi fyri, at tænastan og góðskan á summum økjum lækkar, og hetta kann vera ein óhepping gongd, alt meðan vit frammanundan hava ilt við at fáa skikkað starvsfólk at manna størvini á sjúkrahúsverkinum.

### Politisk fokus

Tummas í Garði heldur, at ein av avleiðingunum av privatu sjúklingartryggingini eigur at vera, at meira politiskt fokus verður sett á heilsuverkið í Føroyum sum heild.

– Tí tað er ein sannroynd, at vit framhaldandi skulu taka okkum av akuttum tilburðum her heima, samstundis sum vit eiga at umhugsa, um vit í størri mun eiga at senda meira krevjandi viðgerðir til onnur lond, sigur Tummas í Garði, sum í hesum sambandi nevnir, at tað ikki bara er Ríkissjúkrahúsið vit hugsað um, tá vit senda fólk av landinum.

Hans Pauli Strøm:

## Privat sjúklingatrygging brýtur siðvenju

**Um vit fáa eina privata sjúklingatrygging í Føroyum, er talan um eina ógvuliga prinsipiella broyting, sum brýtur við allar siðvenjur, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sum ikki ynskir at viðmerkja málið enn**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur við Sosialin, at hann ikki hevur hoyrt um nýggja tilboðið frá Trygd, sum bjóðar viðskiftafólki sínum at tryggja sær viðgerð á einum privatum sjúkrahúsi uttanlands. Tí hevur hann heldur ongar viðmerkingar til málið júst nú.

– Eg vil hava stundir at hugsa meg um og at samsifta við onnur, áðrenn eg meldi nakað út um hatta. Hetta ljóðar sum, at skipanin líkist teimum, sum vit eitt nú kenna úr Danmark. Og um so er, at vit fáa eina privata sjúklingatrygging í Føroyum, er talan um eina ógvuliga prinsipiella broyting, sum brýtur við allar siðvenjur, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.